# Flogvøllurin var vandamikil




Linate-floghavnin í Milano lýkur als ikki krøvini til eina so stóra floghavn.

Myndugleikarnir í Italia eru í øðini, eftir at italskir fjølmiðlar hava almannakunngjørt eina frágreiðing, sum vísir á álvarssom brek í Linate-floghavnini í Milano, har ein vanlukka mánamorgunin kravdi 118 mannalív.

Silvio Berlusconi, forsætisráðharri hevur boðað frá, at stjórnin fer at seta eina nevnd at kanna viðurskiftini í sambandi við Linate-floghavnina. Frammanundan hevur innanríkisráðharrin verið sera hvassorðaður ímóti teimum, sum hava havt ábyrgdina av floghavnini.

Kanningin, sum italsku fjølmiðlarnir hava umrøtt, bleiv gjørd í juni í fjør, tá tvey flogfør mundu stoytt saman í Linate-floghavnini. Nevndin, sum gjørdi kanningina, vísti í sínari frágreiðing á 45 ymisk brek, sum kundu enda við samanstoyti millum tvey flogfør.

– Tað er ófatiligt, at tað yvirhøvur skal bera til at knýta eina so syndarliga vanlukku at gáloysni ella tí, sum verri er. Og her tosa vit um ein av teimum týdningarmestu býunum í Evropa, segði Berlusconi, forsætisráðharri í gjár.

### Óskil

Italsku fjølmiðlarnir hava eisini víst á, at Linate-floghavnin fekk nýggja radarútgerð fyri nøkrum árum síðani, men at útgerðin ongantíð hevur virkað.

Tað er eisini komið fram, at flogleiðararnir í Linate-floghavnini høvdu kært seg um, at eftirlitsmanningin var alt ov lítil samanborið við ferðsluna um vøllin.

Skrivarin í felagnum hjá italsku flogleiðarunum, Dario Baloetta, segði týsdagin, at ferðafólkatalið í Linate-floghavnina er vaksið sera nógv. Fyri tveimum árum síðani ferðaðust tvær milliónir fólk um Linate, og nú er talið heilar 25 milliónir, uttan at ein einasti flogleiðari er komin í starv, sigur Dario Baloetta.

*(Fartekst)*

# Irak næsta málið

Óttin fyri yvirgangsatsóknum við bakteriologiskum ella kemiskum vápnum er vaksin nógv. Irak kann tí gerast næsta bumbumálið.

Irakski forsetin, Saddam Hussein, hevur leingi roynt at gera tílík vápn, og haraftrat stendur landið á yvirlitinum yvir lond, sum styðja altjóða yvirgangsfelagsskapir sum t. d. al-Qaeda hjá bin Laden.

Irakski uttanríkisráðharrin, Naiji Sabri, segði týsdagin, at leypa amerikanarar og bretar á Irak nú við teirri grundgeving, at landið styðjar altjóða yvirgang, sum er grundgevingin ikki annað enn hjáputur. Tann veruleika ætlanin við einum tílíkum álopi kann ikki vera annað enn at gera av við irakska leiðaran, segði ráðharrin.

Amerikanski ST-sendiharrin, John Negroponte, segði mánadagin, at amerikanska avgerðin um sjálvverju ímóti altjóða yvirgangi kann bera í sær, at onnur lond gerast bumbumál.

### Einki eftirlit

Tað er alment kent, at fleiri í amerikansku stjórnini fegnir høvdu tikið undir við einum álopi á Irak og Saddam Hussein, men eitt tílíkt álop kann koma USA aftur um brekku, tí tað hevði uttan iva fingið fleiri av teimum arabisku londunum at umhugsa stuðul sín til amerikanska bardagan ímóti yvirgangi.

ST sendi vápnaeftirlitsmenn til Irak eftir Flógvakríggið, men Saddam Hussein tveitti eftirlitsmenninar á dyr fyri trimum árum síðani. Hesi árini hevur tí einki eftirlit verið við iraksku vápnaframleiðsluni.

Ein frágreiðing fyrr í ár segði, at Irak helst verður ført fyri at gera sína fyrstu kjarnorkubumbu innan seks ár, og at landið hevur framt munandi útbyggingar innan aðra vápnagerð seinastu árini.

*(Fartekst)*

# Skert flog

**Flogfeløgini eru rættiliga fjaðursár í hesum døgum. Summi noyðast at leggja rutur niður, meðan onnur beinleiðis eru hótt av húsagangi**

FLOGFERÐSLA




Tað stendur illa til hjá flogferðsluni um stóran part av heiminum. Húsagangir hótta, og fleiri rutur verða niðurlagdar.

Danska flogfelagið Maersk Air boðaði í tíðindaskrivi mikudagin frá, at felagið leggur tríggjar millumlanda rutur niður.

Sagt verður frá Maersk Air, at ruturnar millum Billund og Dublin, Billund og Milano eins og rutan millum København og Cairo, verða niðurlagdar, tá summarferðaætlanin endar tann 27. oktober.

Beinleiðis orsøkin til niðurleggingarnar er tann, sigur Maersk Air, at ferðafólkatalið er ov lítið. Hetta hevur felagið tikið til eftirtektar og steingir, meðan tey enn sjálv finna hurðina.

Eisini onnur flogfeløg eru tung á flogi í hesum tíðum. Sveisiska felagið Swissair er farið í gjaldsteðg.

Tað hevur so aftur havt við sær, at belgiska flogfelagið Sabena, sum Swissair er stórur partaeigari í, eisini er komið í trupulleikar og farið í gjaldsteðg.

Grundina til hesa nýggju støðuna siga feløgini vera tær skakandi hendingarnar í USA, sum hava gjørt, at fólk stutt sagt ikki tora aftur í luftina.

Men eisini aðrastaðni stendur illa til fíggjarliga hjá flogfeløgunum. Granni okkara, Icelandair, hevur ógvuliga ilt í lummunum, eins og amerikansk flogfeløg eisini verða hótt av húsagangi.

Amerikanska stjórnin hevur sæð seg noydda til beinleiðis at stuðla flogfeløgunum fíggjarliga við upphæddum, sum telja milliardir av dollarum.

Vánaliga fíggjarstøðan hjá flogferðsluni er ikki spildurnýggj. Árið í fjør royndist heilt vánaligt hjá fleiri feløgum, sum høvdu rættiligt hall á roknskapinum.

Tó vóru undatøk, sum vístu vinning. Eitt teirra var okkara egna lítla flogfelag, Atlantsflog, sum sambært roknskapinum í fjør kom rættiliga væl frá árinum við einum rímiligum yvirskoti.

Tað forðar kortini ikki fyri, at ferðaseðlaprísirnir nú fara at hækka. Tó ikki av tungari fíggjarstøðu, uttan orsakað av, at allar tryggingar eru hækkaðar munandi eftir álopini í USA.

**ej**



# Fólkapensiónin skal hækka



*Helena Dam á Neystabø, formaður Sjálvsstýrisfloksins, setir sum treyt fyri at atkvøða fyri fíggjarlógini, at fólkapensiónirnar hækka í minsta lagi 30 milliónir krónur*

**Sjálvstýrisflokkurin setir sum krav fyri at atkvøða fyri fíggjarlógini, at fólkapensiónin hækkar. Tað skal fíggjast við at hækka fíggjarlógarkarmin ella skarva av øðrum játtanum á fíggjarlógini**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Fólkapensiónin skal hækka so mikið, at tað merkist væl hjá pensionistunum. Fíggingin má fáast við at hækka fíggjarlógarkarmin ella við at taka av øðrum játtanum á fíggjarlógini. Verður tað ikki gjørt, er ikki væntandi, at Sjálvsstýrisflokkurin atkvøður fyri fíggjarlógini.

Helena Dam á Neystabø, formaður Sjálvsstýrisflokksins, er púra avgjørd í síni søk. Hetta er eitt mál, sum flokkurin hevur lagt stórt arbeiði í og hevur borið stórar umkostningar av. Bæði flokkurin sum so og hon sjálv persónliga sum landsstýrismaður. Og nú skal málið avgreiðast politiskt, sigur hon.

Sjálvsstýrisflokkurin arbeiðir við eini eftirlønarskipan, sum sambært landsstýrismanninum við almanna- og heilsumálum, Sámali Peturi í Grund, skal loysa fólkapensiónina av. Men tað forðar ikki fyri, at fólkapensiónin skal hækka nú beinanveg, sigur Helena Dam á Neystabø, flokksformaður.

Hon sigur, at fólkapensiónin hinvegin júst er ein treyt fyri, at eftirlønarskipanin, sum arbeitt verður við, kann gjøgnumførast. Tann skipanin er ein skipan, sum fer at galda fyri komandi ættarlið, meðan tey, sum nú eru pensionistar, skulu hava ein bata her og nú. Ein bata, sum tey merkja á pengapunginum, sigur hon.

Helena Dam á Neystabø vísir til seinastu hækkingina, sum gjørd varð. Tá vórðu lagdar 1.000,- krónur oman á viðbøturnar. Tað var ein hækking, sum til samans kostaði einar 30 milliónir krónur. Og kravi frá Sjálvsstýrisflokkinum nú er, at hækkingin, sum kravd verður, skal vera minst líka stór sum tann seinasta. Tað vil siga, at flokkurin vil hava í minsta lagi 30 milliónir krónur afturat settar á fíggjarlógini til fólkapensiónir.

### Karsten veit av

Helena Dam á Neystabø sigur, at tað er ikki rætt, tá Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, sigur, at hann einki kennir til hetta kravið, Sjálvsstýrisflokkurin setir, nú fíggjarlógin er til fyrstu viðgerð í tinginum.

Hetta er mál, sum ofta hevur verið viðgjørt, sigur Helena Dam á Neystabø. At tað verður tikið fram nú, er tí, at hetta er eisinast møguleiki, sum eftir er at fáa tað viðgjørt, áðrenn fíggjarlógin verður samtykt, sigur hon.

Hon ásannar, at tað hevur ikki borið til at fáa fólkapensiónirnar hækkaðar, tí ymsu landsstýrismenninir hava lagt síni ynski og krøv fyri landsstýrismannin við fíggjarmálum, sum síðan skal býta út tað, sum er at fáa úr stórapotti.

Væl vitandi um, at hetta kann takast sum beinleiðis valagn, sigur Helena Dam á Neystabø, formaður í Sjálvsstýrisflokkinum, at tað er tað ikki. Hetta er stutt og greitt eitt hjartamál hjá flokkinum, sum tey nú síggja detta niður ímillum. Tí verður tað gjørt vart við hetta soleiðis nú.

Og hon dugir ikki at síggja, at tað skal vera nakar flokkur, ella fyri tað tinglimur, sum iki tekur undir við at hækka fólkapensiónirnar. Tí væntar hon eisini, at tær verða hækkaðar, áðrenn fíggjarlógin verður endaliga samtykt.

### Taka av aðrastaðni

Tá kravt verður, at fólkapensiónirnar skulu hækka við í minsta lagi 30 milliónum krónum, má eisini vísast á, hvaðani teir pengarnir skulu fáast.

Tað hevur Sjálvsstýrisflokkurin eisini víst á, sigur Helena Dam á Neystabø. Tað skal gerast við at hækka fíggjarlógarkarmin ella í øðrum lagi at taka av øðrum játtanum á fíggjarlógaruppskotinum, sum fyriliggur.

Sjálvt fíggjarlógaruppskotið, sum gjørt er, er ikki so mikið rúmsátt, at 30 milliónir eru at taka av. Avlopið er sett til 159 milliónir. Av teimum skulu 141 brúkast til at avdraga skuld, meðan 18 milliónir so vera eftir. So har fer at mangla í.

Men Helena Dam á Neystabø vísir á, at inntøkuætlanin er sett í lægra lagi. Í hvussu er eftir sum gongdin higartil hevur verið. So kanska kundi okkurt gjørst har, um sjálvur karmurin um fíggjalógina rúmkaðist eitt sindur.

Hinvegin vísir hon á, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur verið ríkiliga gávumildur við íløgum á fíggjarlógini. Serliga eru tað tær væl kendu í samferðsluna, sum hava fingið stóran part, sigur Helena Dam á Neystabø. Uttan at siga beinleiðis, at okkurt kann takast haðani, metir hon, at verður ikki annað møguligt, skulu pengar takast av øðrum játtanum á fíggjarlógini at fíggja eina munandi hækking av fólkapensiónini fyri.

Sjálvsstýrisflokkurin kann undir ongum umstøðum góðtaka, at stórar íløgur verða gjørdar »upp á bekostning« av fólkapensionistunum.